# Sum ein nýggj Lena

MJÚS
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Tað var ótrúligt at síggja, hvussu nógv Lena hevur ment seg seinasta árið, síðan hon helt útgávukonsert í sambandi við útgávuna av "Can't erase it". Serliga tá hon spældi løgini "Can't erase it" og "Catch 22" var menningin sjónlig.

Eitt er at hon er vorðin nógv meira pallvand, men eisini mátin, sum løgini vóru løgd til rættis, var frálíkur. Konsertin var annars merkt av nógvum nýggjum løgum, og tað var tíðiligt, at Lena og Niklas hava nógv uppá hjarta.

Fyrsta part av konsertini spældu Lena og Niklas einsamøll, og samspæli millum hjúnini var framúr. Tá Jóhannus á Rógvu og James Olsen komu á pallin fekk framførslan meira botn.

Tað klæðir løgunum hjá Lenu og Niklas at verða klædd í henda einfalda búna. Á fløguni "Can't erase it" tyktust løgini ofta ov stórsligin á ein ringan hátt, men við kassagittara, bassi og trummum rigga tey nógv betur.



# Gestir kravdu meira enn teir góvu

MJÚS
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Gestir høvdu ongan trummuleikara við á MjúS, og eg var satt at siga eitt sindur spentur at vita, hvussu Prix vinnararnir í 2003 fóru at ljóða uttan trummir. Men niðurstøðan gjørdist tíanverri ikki so jalig. Bólkurin spælir sveimandi, droymandi rokk, sum Jeff Buckley og Radiohead, men her er hvørki talan um Radiohead ella Buckley. Í sínum nýggja líki uttan trummur tyktist tónleikurin krevjandi, einstáttaður og í longdini keðiligur.

Umframt egin løg tolkaðu Gestir eitt lag hjá Buckley og eitt hjá Clickhaze, hesi løg vóru tillagaði til at ljóða av Gestum, og brutu sostatt ikki frá. Eg havi ofta hoyrt Gestir betur enn hetta, og vóni, at trummuleikarin verður skjótur aftur. Tann manglandi áskoðaravinarligheitin í tónleikinum, sáðst aftur í, at nógv fólk hvarv av sjálvum konsertplássinum, meðan teir spældu.

# Martin Joensen er ein føroyskur Bob Dylan

MJÚS
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Tað var ein blúskendur og vælupplagdur Martin Joensen, sum gav MjúS gestum eina sanna røð av hittum. Alt frá løgum úr sangleikinum "Skuggagestum", til ein jassutta útgávu av "60'unum" og eitt sindur av rokki í "Svarti Ravnur". Eisini vóru nýggj løg, sum "Eg havi tað gott" eitt fantastiska jaligt lag, sum er um at bresta av lívsgleði.

Lekkur - er kanska besta orðið at brúka um framførsluna hjá Martini. Hann og bólkurin; Eyðun Hansen gittar, Pauli Magnussen bass og James Olsen trummir, fluttu seg í gjøgnum lagaskattin hjá Martini, og hæddarpunktini vóru syngi-við-slagararnir úr Føroya Fólks sangbók, "Morgun" og "Ró". Tá bólkurin endaði konsertina við "Ró" var festivaluppliving hægri enn nakrantíð annars hetta kvøldið.

Eingin ivi er um, at Martin Joensen er eitt tónlistarligt flogvit, og tann lagaskattur, sum hann hevur skapt, er einki minnið enn ein dýrgripur. Her er talan um ein sannan føroyskan Bob Dylan.

# Poppkorn er gullkorn



MJÚS
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Gentubólkurin Poppkorn var væl gjøgnumførdur poppur, og unga songkvinnan Lillian Dalsgaard er ein sonn stjørna. Hetta verður eitt navn vit fara at hoyra nógv til í framtíðini.

Talan var, sum so ofta er innan tílíkan tónleik, um lutvíst playback. Men røddin hjá Lillian lá oman á, og hetta var ein frálík rødd. Umframt røddina hevði unga songkvinnan sera jaliga útstráling, og hon kom væl út um pallkantin. Tað var tíðiligt, at hon elskaði at standa á einum palli.

Hennara dansarar og backingsangarar, sóu harafturímóti fjálturstungnar út, og taktfestið í dansinum var rættuliga svingandi hjá nøkrum teirra. Hetta komst ivaleyst av nervum, men var óheppið fyri framførsluna, tí Lillian sjálv var eitt gullkorn.

# Bál, Villmenn, Kikki og Eyðfinn

MJÚS
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Tá Saybia fór av pallinum, tók DJ Eyðfinn Drewsen yvir. Í teltinum spældi svensktopsangarinnan Kikki Danielsson, og á sandinum vórðu bál tendra og Villmenn spældu báltónleik.

Kikki og hennara bólkur vóru sera vælspælandi. Í øllum førum tí løtuna vit hoyrda hana. Síðan leitaðu vit okkum omana á sandin til bálið, har Villmenn spældu, og bál brendu. Hugnin hekk tjúkkur í luftini. Villmenn vóru heilt ótrúliga vælegnaðir til júst hetta slag av konsert. Bólkurin hevur eitt rátt, punkkent ljóð, og blandið millum heimagjørd løg og punkaðir kvøðuljómaslagarar var sera væleydnað. Villmenn vóru fantastiskir.

# Sjórænarar á MjúS



MJÚS
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fyrst tiltakið á MjúS var fyri børn, og var sera væl eydna. Væl oman fyri hundrað børn vóru niðrið á sandinum, tá sjórænarar ein løtu yvirtóku festivalin, og tóku øll børnini við á eina spennandi og villa skattajakt.

Knappiliga kom eitt annað sjórænaraskip til sjóndar. Ein bátur var settur út, og ein flokkur av sera óndum sjórænarakonum kom inn við bátinum. Alt endaði í hurlivasa og bardaga og øðrum herligheitum. Ein góð byrjan á ein sera spennandi festival.